Summar FESTIVALUR - har hittini hittast



# FESTIVALTÍÐINDI

við Ragnhild Ellingsgaard



Anfinn Nielsen lovar storm yvir Vágsbø, tá Anfinn og Co koma á pallin á Summar Festivalinum

Myndamaður: Anton K. Højgaard

Anfinn & Co:

## Lova storm yvir Vágsbø

**Fyri tveimum árum vóru Anfinn & Co rendir upp á stóra pallin at spæla, tá veðurlíkindini forðaðu útlendskum bólkum at koma til landið til tíðina. Og hetta var vorðið sum framførsla! Nú eru teir aftur klárir til enn eitt tørn á Summar Festivalinum..**

TÓNLEIKUR
*Ragnhild Ellingsgaard*

“Eg eri ein glæviiiiir.... Havnamæviiiiir”. Orðini verða nærum drigin út í tað óendaliga í venjingarhølunum í Dávavirkinum í Klaksvík, tá Anfinn Nielsen við eyðkendu røddini hitar upp til eitt brak av eini konsert á Summar Festivalinum 2009. Við eini framúrskarandi manning afturat sær sjálvum ivast hann onga løtu í, at framførslan í ár verður eins góð – um ikki enn betur – enn tiltikna konsertin á SF 2006, tá Anfinn & Co vegna seinkingar hjá teim útlendsku bólkunum hálvgum endaðu sum eitt høvuðsnavn á stóra pallinum.

- Tann framførslan var jú heilt fantastisk fyri meg. Hatta var jú slett ikki meiningin, men stóra mannarúgvan var alvorliga við uppá tað! Har var heilt proppað av fólki, sum øll stóðu og sungu við, minnist Anfinn aftur á løtuna.

Tað hevur tó ongantíð verið gamalt fyri raskar menn at leggja seg hvílandi niður á laurberjabløðini, so í farnu viku fór Anfinn saman við bólkinum undir venjingarnar til avbjóðingina fyri framman; nevniliga eina framførslu á SF 2009, sum skal blása alt og øll púrasta umkoll.

Við eini framúrskarandi manning, sum umframt Anfinn Nielsen telur Magna Husgaard, Mikkjal Hvannastein, Petur Hans Niclasen, Fróða Baldvinsson, Jens Paula Joensen og Karl Martin Samuelsen verða gomlu løgini latin í ein nýggjan, nógv meira rokkutan ham og hoyrist tað heilt týðiliga út frá venjingarhølunum, at talan her er um svangar menn, sum vilja trýsta hvønn tann einasta tónan út í nakað, sum veruliga kann fáa fólk upp at koyra.

- Eg havi tveir fantastiska dugnaligar gittaristar við mær hesuferð – og tað fer at hoyrast! Teir hava fingið nærum frítt spæl, so nøkur av teim gomlu løgunum eru rættiliga nógv broytt. Til tað betra, sjálvandi, lovar Anfinn.

Anfinn gav í septembur 2008 út nýggja fløgu og hevur hesin bólkurin tí spælt regluliga saman fram til jóla sama ár. Men við einum burturstøddum oddamanni hevur verið longri millum venjingarnar í nýggja árinum, so nú verður koyrt á við venjingum næstan hvønn dag.

- Stemningurin her úti í Dávavirkinum millum okkum menn er ótrúliga positivur, so eg gleði meg ótrúliga nógv til endiliga at sleppa at standa á pallinum aftur, sigur Anfinn og lovar, at teir allir fara at gera sítt allarbesta fyri at geva festivalgestunum eina heilt serliga uppliving.

Á skránni verða sjálvandi kend løg sum “Útsalg, “Cirkus Tingens” og “Í Skúrið”, men pláss verður eisini gjørt fyri løgum, sum klaksvíkingurin búsitandi í Nólsoy hevur latið úr hondum í nýggjari tíð.



## Túnatos

**Jan Nystrøm er klaksvíkingur búsitandi beint við sandin í Syðrugøtu. Jan er 27 ára gamal.**

**1. Ætlar tú tær á SF í ár?**
*Allarhelst. Eg eri úr Klaksvík, so man kan ikki "ikki" vera har.*

**2. Hvør hevur verið besta konsertin nakrantíð á SF?**
*The Ghost í 2008 var besta konsertin. Men Hanus G. Johansen er The Man! ;)*

**3. Svevur tú í tjald ella í ordiligari song, tá tú ert á SF?**
*Tað verður songin.*

**4. Hvør hevur verið løgnasta uppliving, tú hevur havt á SF?**
*Eg veit ikki, um tað endiliga er so løgið – men eg haldi tað vera merkverdigt, at man skal fáa gásarhúð HVØRJAFERÐ, Hanus G. fer á pallin..!*

**5. Hvat gleðir tú teg mest til á SF 2009?**
*Nú er eitt sindur síðani, at eg havi hoyrt BIAB, so tað skal verða gott! :)*



## Sjúrður og Ólavur í toppformi

Ein góður festivalur hevur brúk fyri góðum frásøgufólkum á pallinum. Undanfarin ár hava víst, at Summar Festivalurin hevur fatur á tveimum av teim allarbestu – og teir báður halda áfram.

Sjúrður Skaale verður aftur frásøgumaður á stóra pallinum á Vágsbøi, meðan tað í Flagstjaldinum verður Ólavur Klakk – ella skuldu vit kanska heldur sagt Ólavur Presley, sum kemur at presentera bólkarnar.

Teir hava báðir á undanfarnum festivalum verið í toppformi og eru fúsir at taka eitt tak afturat á Føroya størsta festivali.

## Freistin til bílig atgongumerki longd ein dag

**Áhugin fyri Summar Festivalinum er sera stórur. Hóskvøldið vóru atgongumerki útseld á fleiri sølustøðum kring landið, og tí hevur Summar Festivalurin gjørt av at útseta príshækkingina í ein dag**



Á fleiri Magn-støðum vóru atgongumerki til Summar Festivalin útseld hóskvøldið. Nógv fólk fingu tí ikki fatur á atgongumerkjum, áðrenn prísurin eftir ætlan skuldi hækka fríggjadagin.

Tí hevur Summar Festivalurin gjørt av at útseta príshækkingina á atgongumerkjum í ein dag og kunnu fólk eisini fríggjadagin keypa atgongumerki fyri tann bíligara prísin. Leygardagin hækkar prísurin so við hundrað krónum.

Atgongumerki til Summar Festivalin kunnu keypast á Magnstøðum, í Telebúðum og á Teleshop.fo. Vikuskiftispassið kostar 950 krónur, men leygardagin hækkar prísurin við